## Fiskaaling skal kannast

Nú skal kannast út í æsir, hvønn týdning fiskaaling kann fáa fyri Ísland. Í tí sambandi hevur Einar K. Guðfinnnsson, fiskimálaráðharri, sett ikki minni enn tvær nevndir at kanna ymisk viðurskifti. Onnur skal kanna toskaaling, og hon skal serliga kanna møguleikarnar fyri at byggja smolt- og yngulstøðir til at ala ymsan matfisk. Hin nevndin skal kanna lívfrøðiligu og fíggjarligu møguleikarnar fyri at ala krækling við serligum atliti til umhvørvið.



## Vallyfti mugu bíða

Fyrradagin tók danska stjórnin aftur eitt uppskot, sum hon legði lagt fyri Fólkatingið um at hækka barnastuðulin til børn undir trý ár. Undir valstríðnum herfyri lovaði stjórnin annars at hækka barnastuðulin, men skattamálaráðharrin sigur, at tíðin er ikki tann rætta. Nú siga politikarar hjá samgonguni, at fleiri onnur vallyfti mugu eisini útsetast, tí búskapurin er yvirhitaður. Sostatt lurtar stjórnin eftir teimum, sum hava ávarað hana.

# Hóast betri fiskaprísir mi

**Tað, sum sermerkir gongdina í okkara fiskiskipaflota í løtuni, er, at veiðivirðið minkar. Ein týðandi orsøk er, at minni toskur er at fáa, og eisini hevur verið heldur minni at fingið av upsa. Verksmiðjutrolararnir hava eisini havt minkandi veiði. Øktu fiskaprísirnir hava ikki megnað at hildið veiðivirðinum uppi, samstundis sum oljuútreiðslurnar tyngja um raksturin hjá fiskiskipaflotanum**



FISKIFLOTIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu árini hevur grannskoðarafelagið P/F Rasmussen & Weihe gjørt eina roknskapargreining av føroyska fiskiskipaflotanum. Í tølum, sum í fyrsta lagi byggja á almennar roknskapir og aðrar upplýsingar, sum fyritøkan hevur útvegað sær, verður hugt at, hvussu gongdin er í hvørjum skipabólki sær, og hvussu heildargongdin er í fiskiskipavinnuni.

Í november/ desember er frágreiðingin hjá grannskoðarafelagnum vanliga liðug fyri árið fyri, og síðan ger felagið samanburðir við onnur ár, sum felagið áður hevur greinað. Ein meting er eisini um árið, vit eru í, og at enda verður mett um útlit.

Tá ið roknskapargreiningin er liðug, plagar felagið at bjóða viðskiftafeløgum til framløgu í hølum felagsins, og henda framløga verður seinnapartin í dag.

Roknskapargreiningin, sum verður løgd fram í dag, fevnir soleiðis um megin-partin av fiskiflotanum yvir 110 tons fyri árini 2002-2006.

Útróðrarflotin er ikki við í greiningini, tí í hesum partinum av flotanum eru bert fáir bátar, sum eru skipaðir í partafeløg ella smápartafeløg við skyldu at lata inn almennan roknskap.

Á hvørjum ári leggur Rasmussen & Weihe dent á, at tey, sum lesa frágreiðingina, kunnu gera sínar egnu niðurstøður. Tilfarið er rúgvusmikið og kann tí greinast á ymiskar hættir. Kortini staðfestir fyritøkan, at stórar broytingar eru farnar fram í fiskiskipaflotanum í tíðini 2002-2006.

Sosialurin hevur hugt at niðurstøðunum í frágreiðingini, og vit verða eisini við til framløguna, sum verður í dag.

### Gongur afturá

Roknskapargreiningin býtir skipabólkarnar í átta vinnugreinar, 1) Pelagisk vinna, 2) Rækjuvinna, 3) Verksmiðjutrolarar, 4) Partrolarar, 5) Lemmatrolarar, 6) Línuskip, 7) Garnaskip og 8) Onnur skip.

Fyrstu talvurnar í frágreiðingini fevna um samanlagda fiskiflotan.

- Sum heild hevur fiskiflotin havt stóra afturgongd árini 2002-2004. Afturgongdin vendir kortini til framgongd aftur í 2005. Ársúrslitið fyri 2006 er væl betri enn í 2002, men tá ið "óvanligt" er tikið burtur úr, er úrslitið á leið tað sama.

Tað, sum felagið kallar "óvanligt", snýr seg eitt nú um skipasølur.

Roknskapargreiningin fevnir ikki um árið 2007, men grannskoðarafelagið heldur ábendingar vera um, at árið í ár møguliga verður eitt sindur lakari hjá øllum skipabólkum undir einum.

- Sambært tølum hjá Føroya Fiskimannafelag (FF) er samlaða veiðinøgdin í tíðarskeiðinum januar/ september 2007 minkað við umleið 12% samanborið við somu tíð árið fyri. Sambært hagtølunum er samlaða veiðivirðið eisini lækkað út við 4% fyrstu 9 mánaðirnar í 2007 í mun til somu tíð í 2006.

Hetta merkir, at øktu fiskaprísirnir ikki heilt klára at byrgja uppfyri minkandi veiðinøgdini.

### Pelagisk skip

Pelagisku skipini, sum er tey, ið serliga veiða svartkjaft, sild og makrel, høvdu ikki serliga gott ár í 2002. Tey hava havt eina munandi afturgongd fram til 2004.

- Í 2005 gongur tó framá aftur, og serliga í 2006 hevur pelagiski flotin havt eina stóra framgongd. Sambært FF er miðalprísurin hjá pelagisku skipunum øktur nakað fyrstu 9 mánaðirnar í 2007, men samlaða veiðan er nakað minkað.

Grannskoðarafelagið sigur, at pelagiski flotin er rímiliga væl konsolideraður og er annars væl fyri sum heild.

- Líkt er til, at samlaða veiðivirði hjá hesum skipum verður nakað hægri í 2007 enn í 2006, men við høgu oljuprísunum kunnu vit rokna við, at úrslitið hjá pelagisku skipunum í 2007